# Hvussu man stjórin eita?

Tað er nærum ikki til at trúgva, at Martha Larsen fer um tey 73 árini, næstu ferð hon hevur føðingardag.

Hon er frísk og ferðug, og hevur framvegis onkur smærri arbeiði at gera.

– Ja, klokkan eitt í dag skal eg faktist út at hjálpa eini konu við at vaska, sigur hon.

Tað sá annars ikki so gott út fyri nøkrum árum síðani. Hon var til arbeiðis á Bacalao, tá hon brádliga byrjaði at merkja til pínu í síðuni – tað sum seinni skuldi vísa seg at vera eina nýrasteinur.

– Har var bara eitt at gera: Eg mátti frá arbeiðinum og beinleiðis til hospitalið henda seinnapartin. Og har bíðaði eg í næstan seks tímar, áðrenn eg slapp framat einum lækna, sum síðani fekk staðfest nýrasteinin.

– Hann gav mær boð um at eg mátti drekka nógv vatn, og vísti mær síðani til hvíldarheimið Naina, har eg var ta næstu vikuna, greiðir Martha frá.

Hon kom seg so mikið aftur, at hon sá seg føra fyri – og var avgjørt sinnað fyri tí - at fara aftur til arbeiðis. Men tá spurdi bæði maðurin og dótturin um tað mundi vera neyðugt.

– Ja, tey spurdu meg beinleiðis, um tað var neyðugt. Um eg ikki skuldi taka tað eitt sindur róligt eina tíð.

– Men eg veit ikki, eg dugi ikki annað enn at arbeiða, svaraði eg. - Eg má bara fara aftur til arbeiðis á Bacalao.

So langt kom hon ikki, tí ein dagin var hon farin sær ein gongutúr í býin, og gekk fram við sjómansheiminum, tí sum nú eitur Hotel Tórshavn. So kom tankin til hana – man nakað arbeiði vera til mín her? Hvussu man stjórin eita? Skal eg tora at fara inn at biðja um arbeiði?

– Eg fór so inn har, og møtti har stjóranum, Jeffri Johannesen. Hann bað meg skriva navn og bústað á eitt pappír, og so skuldi hann fáa at síggja, greiðir hon frá.

Trýggjar dagar seinni ringdi stjórin og bjóðaði henni vælkomna til arbeiðis. Her var hon í mong ár, og hevur síðani havt fleiri vaskiarbeiði ymsastaðni í býnum.

– Eg veit ikki, – heilsan er framvegis góð, hóast eg verði 73 í september. Men eg tími framvegis væl at arbeiða, sigur Martha Larsen við einum brosi.

snorri@sosialurin.fo




*Tað er virkiliga synd í teimum sum mistu arbeiðið sítt á Bacalao. Eg møti teimum oftani, og tá vit práta saman siga tey seg øll vera sera kedd um støðuna, sigur Martha Larsen, sum her er avmyndað við tí gamla Bacalao í baksýni. – Summi teirra hava tíbetur fingið arbeiði aftur, men eg veit ikki um øll hava fingið*

# Fjølbroytt virksemi í Grunninum

**GRUNNUR Vestnordenfonden – Menningargrunnur Útnorðurs - varð stovnaður seinast í áttatiárunum. Tað vóru øll Norðurland – eisini Føroyar og Grønland sum stovnaðu Grunnin. Endamálið var at Grunnurin skuldi vera við at menna eitt kappingarført vinnulív í Útnorði. Stovnsfæið var umleið 91 MDKR.**

Fyrstu árini var virksemið mest í Íslandi, men einkult lán vóru eisini veitt í Føroyum og í Grønlandi. Kreppan, ið rakti Føroyar fyrst í nítiárunum og afturgongdin í grønlendska búskapinum mitt í nítiárunum, steðgaðu tey næstu árini í ávísan mun útlánsvirkseminum til hesi bæði lond.

– Í seinnu helvt av nítiárunum ynskti Ísland broytingar í viðtøkunum, soleiðis at Grunnurin ikki skuldi veita lán í Íslandi. Um somu tíð var aftur framgongd í føroysku fiskivinnuni. Fleiri av teimum fiskavirkjum sum ikki vóru við í Fiskavirkings loysnini vóru fíggjað í Vestnorden-fonden, vísir Sverri Hansen, stjóri í Vestnorden grunninum á.

## Verkevni

Í Grønlandi fór man seinast í nítiárunum undir eitt skipað átak at fáa útbygt ferðavinnuna, og harvið eisini gistingarhúskapacitetin. Ein hotellgrunnur var stovnsettur.



**FÍGGING**

*Útnorðurgrunnurin arbeiðir við at fíggja vinnufyritøkur í Grønlandi og sum hava lærlingar. – Ynski er at skapa eitt meiri fjølt\u00e1ttað vinnulív her, sigur Sverri Hansen, stjóri í Vestnorden grunninum*

Hann veitti fígging til bygging av hotellum runt um í Grønlandi. Vestnordenfonden luttók eisini í hesari menning av ferðavinnuni. Hotellini í Uummannaq, Sisimiut og Kulusuk vóru eisini lutvís fíggja av Vestnordenfonden saman við Hotellgrunninum. Vestnordenfonden helt fram at fíggja hotell eisini í Ilulissat og í fleiri øðrum býum, mest í Suðurgrønlandi.

Virksemið hjá Vestnordenfonden síðani aldarskifti hevur verið meiri fjølbroytt. Í Føroyum hevur Grunnurin veitt fígging til smærri ídnaðarvirkir, innan ferðavinnu og orku (vindmyllur).

Í Grønlandi hevur Grunnurin meiri miðvíst arbeitt við fígging av handverkarafyritøkum og tænastufyritøkum. Eisini innan ferðavinnuna hava verið útbyggingar. Handverkarafyritøkurnar, ið Grunnurin hevur fíggjað er í størru býunum, t.v.s. Nuuk, Sisimiut, Ilulissat og Qaqortoq, meðan hotellini eru spjadd runt í Grønlandi, úr Kulusuk, Nanortalik og upp til Uummannaq.

Vestnordenfonden hevur havt mest sum alt sítt fæ útlænt til verkevnir. Tað hevur so havt við sær at útlánsvirksemið hevur verið avmarkað seinnu árini. Grunnurin arbeiðir framhaldandi við luttøku í fígging av einum meiri fjøltáttaðum vinnulívi í Útnorði. Eitt mál, ið arbeitt verður við er at fíggja vinnufyritøkur í Grønlandi, og sum hava lærlingar. Málið er umframt eina vinnumenning, eisini ein førleikamenning av grønlendska ungdóminum.